# Ítróttarblaðið

## HB hevur styrkivant eina rúgvu

**FÓTBÓLTUR Ætlanin er, at HB skal røkka sínum spælitindi, tá altjóða dystirnir skulu avgreiðast í summar. Tað sigur Jón Krosslá Poulsen, sum var leikbannaður, tá HB vann 3-2 á EB/Streymi í gjár**

Uni Holm Johannesen

– Venjararnir hava lagt stóran dent á styrkivenjing higartil. Fjølmiðlarnir hava víst á, at vit tykjast tungir. Tað er fremst av øllum, tí vit hava styrkivant so nógv. Tað er tilvitað, tí vit skulu spæla upp til okkara besta í summar, tá undandystirnir í Champions League eru á skránni, sigur Jón Krosslá Poulsen. Magni Mohr, sum stendur fyri kropsligu venjingini hjá HB, hevur áður havt framúrskarandi úrslit við føroyskum feløgum í altjóða høpi.

uni@sosialurin.fo

# Popczynski biður um umbering

**FÓTBÓLTUR Krzyzstof Popczynski fekk trý kærkomin stig í skjáttuna um vikuskiftið, tá Aarhus Fremad vann 1-0 á Brabrand á heimavølli. Brian Johansen skeyt einsamalla málið í dystinum. Popczynski biður hinvegin áskoðararnar um umbering, tí spælið var sera rótut**

Uni Holm Johannesen

– Eg veit ikki, um úrslitið var rættvíst. Vit spæla ongantíð væl móti Brabrand, tí teir hava sjáldan nakað at bjóða. Teir eru verjukendir og hugsa bara um, at vit ikki skulu fáa mál. Tá tað er sagt, so er vøllurin eisini vánaligur.

Um ein spælari fær bóltin, er møguleiki fyri, at bólturin fer uppfrá og brýtur nøsina á spælarnum. Kommunan má bøta um viðurskiftini. Tað eru 800 áskoðarar til dystin, og tað er harmiligt, at vit ikki kunna bjóða teimum flottari fótbóltsspæl. Vit vilja fegnir spæla fótbólt, og tað vísa vit eisini á útivølli. Tað er hinvegin torført á heimavølli, tí vøllurin er so vánaligur, sigur Popczynski við bold.dk.



*Popczynski nærkast uppflyting. Aarhus Fremad er fremst í triðbestu donsku deildini við 54 stigum. Blokhus FC er nummar tvey við 53 stigum. 18 stig eru eftir at spæla um*



*Føroyski landsliðsleikarin, Johan Troest Davidsen, skifti til Aarhus Fremad í vetur. Hann spældi samfullar 90 minuttir í miðverjuni, tá hann og viðspælararnir vunnu á Brabrand um vikuskiftið*

Føroyski landsliðsspælarin, Johan Troest Davidsen, spældi í miðverjuni hjá Aarhus Fremad í samfullar 90 minuttir í gjár.

### Nærkast uppflyting

Tað er sera tætt í oddastríðnum í triðbestu donsku deildini, men Krzyzstof Popczynski og Aarhus Fremad hava framvegis munin.

Pólski venjarin, sum fór undir yrkisleiðina sum høvuðsvenjari í føroysku kappingini, er nær við at vinna sítt fyrsta gullheiðursmerki sum venjari í donsku kappingini. Popczynski og Aarhus Fremad eru fremst við 54 stigum. Blokhus FC er nummar tvey við 53 stigum. 18 stig eru eftir at spæla um.

Um Aarhus Fremad vinnur deildina, flytir liðið upp í næstbestu deildina. Popczynski skal á vitjan hjá Varde, nummar 14, næsta vikuskiftið. Varde hevur Jacob Bymar, sum fyrr hevur spælt við KÍ, í hópinum.

Talan var um ein sera illa spældan og rótutan dyst. B36 spældi als ikki betri enn KÍ, men teir fingu mál uppá tvey langskot, meðan KÍ ikki fekk mál uppá síni. Liðini høvdu hvør sítt gjøgnumspælt álop í øllum dystinum.
www.nordlysid.fo

Eftir hetta høvdu liðini bæði nakrar hálvar málmøguleikar, men onki annað mál kom í dystinum. Okur frætta úr Leirvík, at FC Suðuroy ikki spældi nakran góðan dyst og í so máta er úrslitið ikki heilt av leið.
www.sudurras1.com

At B68 var so verjukent, kravdi ógvuliga nógv av okkara spælarum, tí tað er trupult at skapa málkjansir, tá ið mótstøðuliðið pakkar seg so nógv saman. Tí eiga spælarar okkara rós uppiborið fyri, at teir komu fram til so nógvar kjansir. At hesir kjansir so ikki góvu mál er ein onnur søga.
www.vikingur.fo

Tað er hugaligt at síggja at vit standa einki aftanfyri væl etableraðu liðini, men hinvegin er tað óhugaligt at tapa. Ungu mennirnir læra hvønn dyst og skulu nokk koma seg.
www.ki.fo